Tiltøk

BERIN
Til børn og ung, ið hava mist foreldur ella systkin. Vit byrja nýggjar bólkar í Beranum í februar. Áhuga eru vælkomin at ringja til á tlf. 222993 ella maila til info@berin.fo. www.berin.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf.

Spælistovan
í Margarinufabrikkini. Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9-12 fyri børnum/ foreldrum uttan ansing.

Listasavnið á Sandi
Sands Listasavn er opið vetrarhálvuna sunnudag kl. 14-16. Bólkar o.o. sum vilja gera seravtalu um aðrar tíðir kunnu ringja á tel. 211924/ 361617 í góðari tíð frammanundan.

Vitjunarvinir
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10, Postsmoga 1015, 110 Tórshavn
Tlf. 319630. Fyriskiparar í Tórshavn, Eyrith tlf. 313784 og 513784 og Marin 314333 og 284333. www.redcross.fo

Giktafelag Føroya
MBF-húsið - Íslandsvegur 10c 100 Tórshavn. Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13 til 16.

Lymfødemfelagið
Tlf. 225224
Íslandsvegur 10 C, Tórshavn
Postrúm 2113, FO-165 Argir

Cøliaki Felag Føroyar
Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783.
Postboks 3120, 110 Tórshavn, hjartafelag@hjartafelag.fo

Kvinnuhúsið
Skrivstovan er opin gerandisdagar frá kl. 10-17. Tlf. 317200 svarar alt samdøgrið. www.kvinnuhusid.fo

Felagið fyri lesi- og skriviveik
MBF-Húsið - Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld.

Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum
MBF Húsið Íslandsvegur 10c, FO-100 Tórshavn.
hoyr@post.olivant.fo
www.hoyribrek.fo

Krabbameinsfelagið
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
www.krabbamein.fo

Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Tlf. 321520
heilaf@post.olivant.fo

Nýrafelagið
Árrás 3, Argir
Form.: Hallbjørg Hansen, tlf. 314796 / 514796

Stoffskiftisfelagið
Millum Gilja 111 - Hoyvík
Les meira á stoffskifti.com

ADHD-felagið
Róhild tlf. 281860/311861, e-mail: bjarta@olivant.fo, Unn tlf. 224253/444053, Petra tlf. 235191/449922 og Harriet tlf, 218053/448053

Sjálvhjálpin
tlf. 280005 mán.-fríggjadag kl. 12-16 og mik. 16-18. www.sjalvhjalpin.fo

Kunningarstovan í Tórshavn
Vaglið 4 - P.O. Box 379
Tel. 30 24 25 - Fax 31 68 31.
Kunningarstovan hevur opið mán-frí 09-17.30 og leygardag 10-14.
www.visittorshavn.fo
www.kunning.fo

Sandoyar Kunningarstova
Mørkin Mikla 3kj. 210 Sandur.
Skrivstovan er opin mánadag-fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 361836
www.visitsandoy.fo

Listasavnið á Sandi
Vetrarhálvuna er Listasavnið opið sunnudag kl. 14-16. Annars er opið eftir nærri avtalu, ið fæst við at ringja á tlf. 228167.

Amnesty International Føroya Deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 9 til 17 og mikudag frá kl. 9 til 16
www.amnesty.fo
amnesty@amnesty.fo

Djóraverndarfelagið
tlf. 504533
postsmoga 1365, Tórshavn.
dvf@dvf.fo

HUFF
Hundaeigarafelag Føroya limur í Dansk Kennelklub, kreds 12. Tlf. 277317. Til ber at tekna seg sum lim og spyrja um eitthvørt viðv. hundum. Hvørt týskvøld kl. 19 ganga vit túr, møtast við Skógrøkt Landsins.

Frítíðarfelagið »Antares«
Postsmoga 11, 490 Strendur. Frítíðarfelag hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum ið starvast í altjóða farma- og frálandavinnu. Meira fæst at vita við at venda sær til Felagið á tlf. 590100, ella um teldupost aldebaran@kallnet.fo

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz

Føroyingafelagið í Stavanger
www.foroyingafelag.com

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48 D, 8000 Århus C
www.aarstova.dk

Blákrossbúðin, Kongagøta 10, Tórshavn
Tekur ímóti góðum klæðum, Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 10-12 og 14-17.30 og leygardag frá kl 11-14
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum.

Blákrossbúðin, Heiðavegur 32, Tórshavn
Tekur ímóti góðum klæðum. Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 13-17:30 og leygardag frá kl 10-13.
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum

ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11-12 á Tinghúsvegi 37.

AA Into action fundur
http://foroyar.aaintoaction.se
Tvøroyri, tórsdag kl. 19-20 í Gomlu læknahúsinum.
Allir fundirnir eru opnir.
www.aaintoaction.se

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20-21
Hósdag: kl. 20-21
Fríggjadag: kl. 20-21 og kl. 22.30-23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17-18.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11-12.
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.

AA-fundir (Big book meeting)
Týsdag: kl. 20. Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

AA-fundir í Vestmanna
adressan er flutt í tey gomlu sýslumannahúsini. Hósdag kl. 20 AA-fundur. Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

Al-Anonfundur
er týskvøld kl. 21 í Torvalds kaffi á kajini í Norðagøtu.

Al-Anon
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

Al-Anon
fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum eru í skúlanum í Porkeri hvørt mánakvøld millum kl. 21-22.

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19 og sunnudag kl. 16 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA fundir á Tvøroyri
(í gomlu læknamiðstøðini) Sunnudag kl. 15. AA fundur (opin fundur seinasta sunnudag í hvørjum mánaða)

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Heilsan

Góða Sigrið
Hjartaliga til lukku við 1 ára føðingardegnum.
Jesus pápi signi tykkum.
Bestu heilsanir Emma omma og Harry abbi

Merkisdagar

Prógv
Tann 28-01-2011 hevur **Eyðhild Mørk í Vági** á Pædagog Uddannelsen Nordsjælland í Hillerød fingið prógv sum Prof.Bachelor í Námsfrøði.

Prógv
Tann 28-01-2011 hevur **Arnleyð Hjelm í Vági** á Pædagog Uddannelsen Nordsjælland í Hillerød fingið prógv sum Prof.Bachelor í Námsfrøði.

80 ára føðingardagur
4. mars fyllir Thomas K. Vilhelm, Vágur, 80 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá hann eru vælkomin hjá dóttrini á Spógvavegi 16 í Tórshavn frá kl. 18 leygardagin 5. mars.

80 ára føðingardagur
Fríggjadagin 4. mars, verður Anna Egholm í Havn, ættað av Glyvrum, 80 ár. Dagurin verður hildin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9. Har verður opið hús, frá kl. 10.30 til 15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

65 ára føðingardagur
11. mars verður Ellbjørg Davidsen, 65 ár. Dagurin verður hildin 6. mars í Starvsmannafelagnum frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

30 og 50 ára føðingardagar
Mánadagin 7. mars fyllir Súni Olsen, Syðrugøta, 30 ár og fríggjadagin 11. mars fyllir Dánjal Jarnskor, Norðragøta, 50 ár. Føðingardagarnir verða hildnir saman leygardagin 12. mars í heiminum hjá Dánjali í Kongsbø 5 í Norðragøtu frá kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Brúdleyp

Brúdleyp
5. mars giftast Sólbjørg Jacobsen og Hans Filip Mohr Jakobsen í Kelduni í Skálabotni. Vígslan verður kl. 13 og receptión verður í Kelduni beinleiðis eftir vígsluna. Øll eru vælkomin.

Leygardagin 2. apríl giftast Karla A. Vang, úr Kaldbak og Anton Rasmussen, úr Runavík. Vígslan verður í Nazaret, Kaldbak, kl. 13. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg hjá Karlu tlf. 265714 ella Anton tlf. 504279 innan 10. mars.

Leygardagin 9. apríl kl. 13 giftast í Kvívíkar kirkju, Jacoba Vang, Leirvík og Leif Sjúrður Petersen, Leynar. Vælkomst, uttan børn, verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, vinarliga boða frá á tlf. 250268, 281947 ella teldupost: vang94@hotmail.com innan 5. mars.

Leygardagin 16. apríl giftast Olina Skorá og Pauli Høj. Vígslan verður í býráðssalinum kl. 14. Øll eru vælkomin. Brúdleypsveitslan verður á læraraskúlanum kl. 19. Tey ið vilja gleðast saman við okkum, kunnu tekna seg innan 25. mars á tlf. 590200 - 584969 eftir kl. 15. Vit gleða okkum at síggja tykkum.

Leygardagin 30. apríl halda Semina Jacobsen Kamsdalur og Jóhan Pauli Heimdal (fyrr Johansen) Lamba, brúdleyp. Hátíðarløta verður í Fuglafjarðar kirkju kl. 14 og døgurðin verður fyri innbodnum. Kl. 20 verður opið hús í bygdarhúsinum í Leirvík, tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, sigi frá á tlf. 22220, 444878 ella 214878 innan 30. mars. Verði hjartaliga vælkomin.